# Jenis spyr um heilsuverkið er eitt botnleyst hol

**Hans Pauli Strøm skal greiða løgtinginum frá, um nakað hald er í uppáhaldum hjá Johan Peturi Davidsen, nú frákoyrda yvirlækna, í Sosialinum herfyri, tá hann m. a. segði, at heilsuverkið er eitt botnleyst hol og at so nógv orka verður brúkt til fyrisiting, at hetta gongur út yvir heilsufremjandi arbeiðið**

HEILSUVERKIÐ

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*


Sosialurin
Sjúkrahúsini:
Gjalda fólki løn fyri at trilla tumlar

*Forsíðan á Sosialinum 2. september í ár, har Johan Petur Davidsen kemur við hørðum kritikki av sjúkrahúsverkinum, sum hann heldur vera alt ov illa rikið. Hetta vara slakar tveir mánaðir áðrenn hann var sagdur úr starvi*

– Er heilsuverkið eitt botnleyst hol? Ber tað til at rationalisera nógv meira enn í dag? Er tað satt, at játtanin í dag ikki verður brúkt so effektivt sum gjørligt?

Sosleiðis ljóða tríggir av spurningunum, sum Jenis av Rana, løgtingsmaður, vil hava Hans Paula Strøm, landsstýrismann í almanna- og heilsumálum at svara.



*Jenis av Rana vil nú hava Hans Paula Strøm, landsstýrismann í almanna- og heilsumálum at svara, um nakað er í øllum uppáhaldunum hjá Johan Peturi Davidsen, nú frákoyrda yvirlækna*

Spurningarnir eru settir, eftir at Jenis av Rana hevur lisið eina samrøðu í Sosialinum 2. september í ár við Johan Petur Davidsen, leiðandi yvirlækna á Landssjúkrahúsinum.

Í viðtaluni segði Johan Petur Davidsen m. a., at:

»… fyrisitingin er vorðin alt ov stór - og hon tykist bert at økjast… Ofta hevur ein varhugan av, at fyrisitingin er blivin eitt endamál í sær sjálvum, og bureukratiið er stórt. Men hetta gerst ein stórur trupulleiki, tá tað fyrisitingarliga virksemið leggur hald á heilsustarvsfólkið, so at orkan verður tikin frá heilsufremjandi arbeiðinum.....«

Jenis av Rana vil tí hava landsstýrismannin at greina fyri løgtinginum, hvussu stórur partur av játtanini til sjúkrahúsverkið verður brúktur til ávikavist fyrisitingarliga økið og til viðgerðarøkið, eins og landsstýrismaðurin skal greina fyri løgtinginum niðanfyri nevndu uppáhaldini hjá Johan Peturi Davidsen:

At

... heilsuverkið er eitt botnleyst hol
... tað ber væl til at rationalisera nógv meira enn í dag
... játtanin í dag verður ikki brúkt so effektivt sum gjørligt
... kanska hevði verið betri at havt eina nógv minni tilbúgving í Klaksvík
... tað er eingin trygd í smáu lokalsjúkrahúsunum
... sjúkrahúsini hava ikki brúk fyri meiri pengum
... fyrisitingin er vorðin alt ov stór
... fyrisitingin tykist bert at økjast
... Fyrisitingin er vorðin eitt endamál í sær sjálvum
... bureaukratiið er stórt
... tað fyrisitingarliga virksemi leggur hald á heilsustarvsfólk, so at orkan verður tikin frá heilsufremjandi arbeiðinum?

Jenis av Rana sigur, at fyri flestu føroyingar, bæði innan og uttan tinggátt, er greitt, at sjúkrarøkt og sjúkraviðgerð á tí søtði, sum vísindin bjóðar í dag, er kostnaðarmikil og er tí sjáldan stórvegis spurnartekin sett við ta upphædd, sum serkønu á økinum mæla til.

– Tí kennist tað so øvugt at lesa hesa greinina _ serliga tá talan er um metingar frá lækna, ið hevur gott innlit og týðandi starv í sjúkrahúsverkinum - ikki bert á viðgerðarøkinum - men eisini á fyrisitingarliga økinum, sigur Jenis av Rana.

Hann vísir á, at um Johan Petur Davidsen hevur rætt í metingum sínum, so er tørvur á djúptøknum kanningum og broytingum, serliga um so er, at játtaði peningurin heldur enn at fara til viðgerðir, fer til fyrisiting og bureaukrati.

Jenis av Rana sigur at enda í viðmerkingunum til fyrispurningin, at síðani hann skrivaði fyrispurningin – og meðan spurningurin hevur bíðað eftir tingfundi at verða lagdur fram á, frættist í miðlunum, at fyrisitingin hevur gujørt av at siga opinskáraða serlæknanum úr starvi.

– Hetta er eitt álvarsligt stig, um hugsað verður um umfatandi læknatørvin, ið er á okkara leiðum.

– Men enn verri um hetta er svarið til uppáhald hansara, heldur Jenis av Rana, sum sigur, at minsta kravið var, at leiðarar sjúkrahúsverksins heldur greiddu borgarunum og brúkarum frá, um støðan er so, sum yvirlæknin vil vera við ella ikki.

– Vónandi kann landsstýrismaðurin greiða hetta álvarsliga og fløkta mál, sigur Jenis av Rana.

## Nýggir leiðarar fyri Frelsunarherin vitja Føroyar

**Kommandørarnir Gudrun og Carl Lydholm eru settir sum nýggir leiðarar fyri arbeiði Frelsunarhersins í Noreg, Íslandi og Føroyum**

FRELSUNAR-HERURIN

Gudrun er fødd í Íslandi, og búði har í 4 ár. Pápin var íslendingur, og mamman dani. Fyri 20 árum síðan gjørdist hon danskur ríkisborgari. Carl er dani, og var pápi hansara ein av fyrstu leiðarum í Frelsunarherinum í Føroyum, í 1927. So Carl gleðir seg at vitja Føroyar á fyrsta sinni, har pápin var sum ungur.

Gudrun var í Føroyum sum 1 1/2 ára gomul. Síðan hevur leiðin gingið víða um í heiminum. Tey hava bæði starvast í Danmark, Onglandi, Russlandi, Georgia, Ukraina og Moldova og áðrenn tey nú komu á okkara leiðir, hava tey verið leiðarar fyri Finland og Eystland.

Tað er áhugavert at lýða á teirra royndir handan jarntjaldið. Carl er frátikin visum og "persona non grata" - óynsktur í Russlandi. Grundgevingin er at hann er "Terrormistonktur" sum limur í terrorfelagsskapinum Frelsunarherinum, og hóttan móti ríkis trygdleika.

Tað er ikki lætt at arbeiða har vitanin um Frelsunarherin er so lítil, og við slíkum feil propaganda. Samstundis sum vit møta slíkum trupulleikum, spyrja myndugleikarnir eftir okkara tænastum. Einaferð høvdu vit býtt út bíbliur í einum býi, tá komu teir ortodoksu prestarnir og samlaðu allar bìbliurnar og gjørdu bál í gøtunum við teimum. Men tað verður gjørt eitt megnar arbeiði . Carl nevnir, at í Georgia geva 1500 Frelsunarher-limir 300 000 menniskjum mat hvøn einasta dag. Arbeiðið fyri gøtubørnum, heimleysum og brekaðum er sera umfatandi. Man leggur stóra orku í at uppgradera menniskja virði. Í mong ár eru tey neyðstøddu avskrivaði sum menniskju.

Í Moldova er stórur vøkstur í arbeiðinun, ja man talar um stóra vekking. Arbeiði spreiðir seg so skjótt at man ikki veitt hvussu nógvar frelsunarher-samkomur eru til eina hvørja tíð.

Gudrun er cand.theol og hevur verið blaðstjóri á Krigsråbet i mong ár. Hon er eisini við í International Docrine Council, sum er ráðgevandi nevnd hjá heimsleiðara Frelsunarhersins. Hevði eg ikki veri offiserur í Frelsunarherinun, hevði eg veri polittikari heldur Gudrun fyri við Krigsråbet. Vit eru bæði sera samfelagssáhugaði leggur hon afturat. Carl hevur verið næstleiðari í Danmarks Ekumeniske Fellesråd í nógv ár.

Vitjanin í Føroyum verður stutt hesaferð, bert 5 og 6 nov.. Almennir fundir verða sunnudagin 6. november í Havn.



*Gudrun og Carl Lydholm*